## Súni settur á beinkin

Eftir at hava byrjað inni í fleiri dystir á rað, var Súni Olsen ikki at finna millum leikararnar, sum byrjaðu inni, tá AaB vitjaði í Viborg.
Venjarin Erik Hamrén setti Allan Olesen inn á vinstra bakk fyri føroyska landsliðsleikaran.
Men við Súna á beinkinum allan dystin eydnaðist tað Aab at vinna ein tryggan 2-0 sigur. Rada Prica skoraði bæði málini, soleiðis at hann nú hevur skorað 15 mál í deildini.
Við sigrinum hevur Aab nú hála seg upp á 45 stig og hóttir nú av álvara OB á triðja plássinum, sum bara hevur eitt stig meira

## Kurt á dómaraseðilinum

Kurt Mørkøre hevði úttikið seg sjálvan til hópin hjá B36, sum sunnudagin spældi móti EB/Streymi. Tað framgongur á dómaraseðilinum frá dystinum. Hann kom tó ikki á vøllin, men var ein av teimum fimm innskiftarunum, B36 hevði.
Hetta er fyrsta árið hjá Kurt Mørkøre, har hann er venjari burtur av. Í Noreg hevur Kurt spælt sum leikandi venjari, og tað gjørdi hann eisini, tá hann var í KÍ 2002.
Kurt hevur annars boðað frá, at hann ikki ætlar sær á vøllin í ár, men eftir øllum at døma sær freistingin út til at verða ov stór fyri gamla málrevin.

AB-B71 1-2 (0-2):

# So bragdaði hjá B71 á Argjum

*GÍ*

*Skála*

**Ein ynskibyrjan við tveimum málum uppá eitt korter. Tað var tað, sum B71 skuldi brúka til at fáa trý stig á Argjum. Soleiðis sær tað út, um eyguni einans eru vend eftir tølunum, sum standa eftir dystin. Veruleikin er tó ein heilt annar, tí tað var eingin løtt uppgáva hjá B71 at hála sigurin suður um fjørðin**



*Clayton Soares og B71 megnaðu ongan tíð at basa AB í fjør. Men við trimum sera týðandi stigum tóku teir eitt stórt fet upp eftir stigatalvuni sunnudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

AB og B71 hava kappast í oddinum á 1. deild seinastu árini. Tá hevur B71 havt tað rættiliga trupult á Argjum. Nú liðini møttu hvørjum øðrum fyri fyrstu ferð í bestu deildini, sær út til at rigga betur hjá sandoyingum á Argjum. Í hvussu so er hvat stigum viðvíkur

Tá skráin fyri kappingarárið varð løgd, líktist dysturin á Argjum 22. apríl eini botnuppgerð, men tá fýra dystir vórðu spældir segði stigatalvan okkurt annað. AB og B71 lógu beint omanfyri strikuna við Skála og VB/Sumba aftanfyri seg. Nú dysturin er av liggur AB framvegis beint omanfyri niðurflytingarstrikuna, meðan B71 hevur lagt sjógv niður til hini liðini í tyngra endanum.

### Tvey meinlík mál

Tað ber ikki til at siga, at argjamenn ikki vóru á vøllinum tá dysturin byrjaði. Men okkurt høvdu teir gloymt eftir í umklæðingarrúminum, tí tá eitt korter var farið vóru sandoyingar frammanfyri við tveimum málum. Argjamenn hugdu málleysir og spyrjandi hvør uppá annan, og sandoyingar høvdu lagt lunnar undir nakað sum líktist einum stórsigri.

Í fótbóltsheiminum verður ofta sagt um óvæntað mál, at tað var sum at fáa kalda pøs av vatni í skortin. Argjamenn fingu tvær av slagnum áðrenn teir raknaðu við.

Fyrstu pøsina fekk AB bara nakrar heilt fáar minuttir inn í dystin. B71 flytur bóltin úr høgru í vinstru síðu, har Símin Hansen prikar bóltin víðari til Clayton Soares, sum hegnisliga lyftur bóltin upp um Magnus Poulsen í AB-málinum.

Tíggju minuttir seinni ynskir Símin Hansen at prógva, at tað ikki bara eru brasiliumenn, sum duga slík kynstur og eisini hann lyftur bóltin upp um málverjan og í málið.

Hesi bæði meinlíku málini kundu verið grundarlag undir einum stórsigri, men eins og móti GÍ, tá AB var aftanfyri við trimum málum, so raknaði heimaliðið við og fekk fótin fyri seg.

Fram til steðgin leikaði javnt við onkrum minni kjansi til hvørt, sum tó hvørki voldi Magnus Poulsen ella Símun Rógva Hansen teir stóru trupulleikarnar.

### AB omaná

Í seinna hálvleiki kom AB enn betur við, og løgdust teir eisini omaná dystin. Nú vóru tað teir, sum settu treytirnar og eitt korter inn í seina hálvleik gav hetta av at býta.

Innskifti danin, Peter Christensen, langaði til bóltin skamt uttan fyri brotsteigin, og tá Símun Rógvi Hansen í málinum hevði snarað høvdinum sat bólturin upp í málhorninum.

### Krevjandi

Seinasta hálva tíman trýsti AB tað, teir vóru mentir, men eyðsýnt er, at liðið enn ikki er samanspælt til Formulafótbólt.

Eins og móti GÍ eru argjamenn onkursvegna ikki klárir, tá dysturin byrjar. Hetta kann koma at kosta teimum dýrt. Ikki bara í stigum, men eisini í orku, tí tað krevur nógva orku og yvirskot at spæla seg afturíaftur ein dyst, sum annars so vónleysur út tíðliga í dystinum. Orka og yvirskot, sum kann vera avgerandi, tá tað resta fimm umfør og ikki bara eru spæld fimm umfør.

Sandoyingar kunnu hinvegin fegnast um ársins næsta sigur. Serliga søtur er sigurin, tí hetta var ein av teimum dystunum, sum teir eiga at vinna, um teir ætla at varðveita sætið í deildini.

## – Vit eru ikki vaknaðir

Rani D. Christiansen var rættiliga vónbrotin eftir tapið fyri B71 í gjár.

– Hatta var skuffandi, tí vit høvdu sett nøsina upp ímóti nøkrum stigum. Nei, hatta var ikki nóg gott, staðfestir Rani D. Christiansen.

– Vit hava nakrar trupulleikar við, at vit ikki eru klárir, tá vit byrja. Vit fáa ein skelk, tá teir skora fyrsta málið, og so fáa vit ein skelk aftrat, áðrenn hin hevur lagt seg. Tað er sjálvandi spell, tí hetta var ein av teimum dystunum, vit eiga at vinna.

– Men vit kunnu bara takka okkum sjálvum fyri, at tað ikki bleiv soleiðis, sigur Rani D. Christiansen, sum tó rósar sínum liðfeløgum fyri at koma gott afturíaftur eftir skelkandi byrjanina.

## Ætlaðu okkum eitt skjótt mál

Uppleggjarin og seinni málskjúttin hjá B71, Símin Hansen, fegnast um tey trý stigini hansara menn fingu skava saman á Argjum í gjár.

– Hasin dysturin er av tí slagnum, sum skal vinnast, so tað var bara óført, sigur Símin Hansen fegin.

– Vit ætlaðu at fáa eitt skjótt mál beinanvegin og tað riggaði. Tað plagar annars at vera soleiðis, at vit eru aftanfyri næstan áðrenn dysturin byrjar, men nú var beint øvugt, sigur Símin, sum heldur, at sigurin var fult uppiborin.